## Sviar eru nøgdir

Sviar eru nøgdir við sítt lutakast til HM-undankappingina. Svøríki kom millum annað í bólk saman við Danmark og Portugal. - Lutakastið kundi verið verri, men tað kundi eisini verið eitt sindur betur. Eg rokni serliga við, at dystirnir ímóti Danmark og Portugal verða truplir, sigur landsliðsspælarin Daniel Andersson. - Eg rokni eisini við, at útidysturin ímóti Ungarn verður trupul, men hetta er ein bólkur, sum vit eiga at koma víðari frá, sigur hann.



H71-Neistin 24-20 (12-13):

# Levi tók broddin av Neistanum

**Í einum til tíðir rótutum dysti, har tað leikaði javntá í fyrra hálvleiki, gjørdist vælleikandi H71-málverjin ógvuliga avgerandi í øðrum hálvleiki.**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Førarasetrið skifti ofta eigara í 1. hálvleiki. Bæði liðini byrjaðu við rættuliga høgari leikferð, men mistu bóltin og brendu. Nakrir minuttir vóru farnir, áðrenn fyrsta málið kom. Neistin hevði eina gylta løtu í 1. hálvleiki har teir vendu 6-4 til H71, til 8-6 til Neistan. Men H71 fekk balansu í roknskapin aftur, teir javnaðu til 8-8, og tá farið var til hálvleiks var bert tað eina málið á muni. Neistin hevði góða eydnu við skjótálopunum, tá var framúr góði H71-málverjin Levi Nybo púra seldur. Men í vanliga álopsspælinum átti Neistin ikki nóg nógv vápn ímóti Levi, og H71-verjuni. Serliga var ein leikari, sum Blagoje Buha rættuliga anonymur fyrstu 30 minuttirnar. Telur ein málini frá, sum Neistin fekk eftir skjótálop, so var tað bara ein slakur fjórðaella fimtipartur teir fingu í vanligum álopsspæli. Esbern Paturson hjá H71 var ikki væl við í 1. hálvleiki, men serliga Niels Viggo Niclassen syrgdi fyri, at H71 alla tíðina hevði samband við Neistan.

### Skoraðu ikki

Fyrstu 9 minuttirnir av 2. hálvleiki gjørdust fundamentið fyri H71-sigurin. Esbern Paturson kom í gongd við málskjótingina, og Halgir Dahl Olesen fekk eisini rættað siktið. Hoyvíkingar stóðu væl í verjuni, og Levi tók fullkomuliga broddin av Neistamonnunum hesa løtuna. H71 vendi hálvleiksstøðuni 12-13 til eina 17-13 leiðslu hesa løtuna. Ikki fyrr enn 9 ½ minuttir vóru leiktir skoraðu neistamenn aftur. H71 helt kortini frástøðuna, og tá hálvleikurin var hálvrunnin var H71 á odda 20-15.

### Neistin nærkast aftur

Men spenningur kom í aftur dystin. Halgir Dahl Olesen fór út á beinkin at hvíla seg. H71-verjan var ikki optimal hesa løtuna, og hetta loyvdi millum annað Blagjohe Buha at koma inn aftur í dystin. Neistin át av H71-leiðsluni, og knappliga var støðan ein tepur 20-18 leiðsla til H71. Men Levi hevði aftur nakrar avgerandi bjargingar, og H71 togaði seg upp aftur á 22-18. Neistin og Buha vildu kortini ikki sleppa heilt, og stutt fyri leiklok høvdu teir aftur samband, 22-20 til H71 var støðan tá. Men Roar Dalsgarð gjørdi ikki royndina hjá Neistanum lættari tá hann fekk reyða kortið eftir 3 ferðir 2 minuttirs útvísingar. Dagsins mál var tá Esbern Paturson snýtti Neistaverjuna, og bankaði bóltin í kassan til støðuna 23-20. Tá var sloppið hjá H71. Løtu seinni bleiv skorað til endaligu støðuna 24-20.

### Rótut men spennandi

Dysturin var heldur rótutur til tíðir, og var hann merktir av, at sterku einstaklingarnir tóku sakina í egnar hendir í avgerandi løtum. Nemanje Rasic í Neistamálinum hevði eisini góðar bjargingar, har í millum eitt brotskast. Men í hesum roknskapinum hevði Levi Nybo munin. H71-verjan hevði ein betri dyst enn Neistaverjan, men hon viknaði tá Halgir Dahl Olesen var uttanfyri tað einu løtuna. Skjótálopini hjá Neistanum riggaðu væl, serliga í 1. hálvleiki. Men teirra besti skjútti úti frá, leikandi venjarin Ingi Olsen kom ongantíð inn á vøllin í Hoyvík ígjár. Fyri Neistan mugu vit vóna, at hann kann taka nøkur tøk í álopspartinum í framtíðini. Tí tann parturin var næstan broddaleysur hjá Neistanum ígjár. Bæði liðini mistu ov ofta óneyðugur bóltar, og vit vóru eisini vitni til at Hanus Kúrberg og Hans Thomassen brískslaðu heldur seint í summum støðum, og seinkaðu onkrum støðum, sum vóru liðunum til fyrimunar í álopsstøðum. Men spenningurin var næstan alla tíðina í dystinum. Og hann bjargar nógvum, eins og Levi Nybo gjørdi ígjár!



*H71 hevur higar til verið stóra positiva ískoytið til hondbóltskappingina. Sunnudagin bastu teir Neistanum, og eru teir nú bert eitt stig aftan fyri oddaliðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

H71-Neistin 24-20 (12-13)
10 min: 4-4
20 min: 9-8
40 min: 17-17
50 min: 20-18
Málskjúttar
H71: Halgir Dahl Olsen 6(1), Niels Viggo Niclasen 6, Esbern Patursson 5(1), Tróndur Vatnhamar 3, Bárður Brimvík 2, Janus Sørensen 1, Dánjal Tórgarð 1
Neistin: Carl Herup Olsen 6, Blagoje Buha 3, Tróndur Kragesteen 3, Johan Brekkstein 2, Dann Thorleifsson 1, Jón Ludvig 1, Jugoslav Djumic 1, Sjúrður Thomassen 1, Jákup Apol 1
Brotskøst: H71 6
Útvísingar: H71 2, Neistin 5
Diskvalifikatión: Neistin 1 (3X2 minuttir)